*framhald av síðu 19*

– Tað kann vera, at at tað finnast serlig flogfør, sum eru egnað til endamálið og sum kunnu brúka vøllin sum er.

Endamálið við loftvegis flutningi má vera, at fiskurin verður flogin so tætt við hjá keyparunum, sum gjørligt.

Men Egil Olsen sigur, eisini, at skal hetta for-svarast fíggjarliga, er tað uttan iva eisini neyðugt, at flogfarið fær farm at flyta heimaftur við.

Og í hesum sambandi heldur hann, at føroyingar mugu broyta hugburð, tí sum er, flyta vit nógv tað mesta inn úr Danmark. Men skal tað eydnast at fáa farm heimaftur við flogfarinum, mugu vit eisini venja okkum við at keypa aðrar vørur enn tær, vit fáa úr Danmark.



*- At taka kappingina upp við kinesarar, er deyðadømt í føðingini. Hinvegin ber tað eisini til at útnytta láglønarlondini til egnan fyrismun, heldur Egil Olsen, fiskivinnufrøðingur*

### Mugu taka í egnan barm

Fiskivinnufrøðingurin heldur eisini, at skal tað eydnast at fáa fatur á feskfiskamarknaðinum av álvara, mugu vit eisini verða til reiðar at ganga undir ávísar treytir frá keyparunum.

Og ein av hesum treytunum er at levera til tíðina.

– Føroyingar mugu vera til reiðar at binda seg til at levera eina ávísa nøgd av einum ávísum fiskaslagi, kanska enntá av einari ávísari støðd um dagin ella um vikuna í so og so langa tíð framyvir, kanska í tríggjar mánaðir fram.

– Tað eru treytir, sum føroyingar mugu vera til reiðar at lúka. Men so mugu vit eisini hava so góðar flutningsmøguleikar, at tað ber til at gera slíkar avtalur.

Men hann heldur, at eitt er at vera til reiðar at gera slíkar avtalur. Eitt annað er at halda tær.

– Føroyingar mugu eisini gera sær greitt, at slíkar avtalur um levering skulu haldast. Og tað fyri einhvønn prís.

Og har heldur hann, at vit mugu taka í egnan barm, tí hann hevur varhugan av, at føroyingar hava ein ávísan trupulleika á hesum øki.

Hann sigur, at eftir tí, hann hevur prátað við fólk í fiskivinnuni uttanlands, hevur hann fingið eina kenslu av, at føroyingar hava trupulleikar við at halda tær avtalur vit hava.

– Tað skínur ígjøgnum, tá ið eg tosi við útlendingar, at teir hava ikki rættiliga álit á, at vit eru førir fyri at halda tær leveringsavtalur, vit gera. Teir spyrja aftur og aftur um tað nú er heilt vist, at vit eru førir fyri at halda avtalurnar, vit gera.

Egil Olsen leggur afturat, at tað er ikki hann sum sigur, at føroyingar ikki eru nóg álítandi. Tað eru fólk í fiskivinnuni uttanlands, sum hava hesa uppfatan av føroyingum.

– Teir siga, at føroyingar halda ikki altíð gjørdar avtalur og tað er ómetaliga óheppið.

Egil Olsen sigur, at skulu føroyingar gera sær nakra sum helst vón um at fáa fótin fastan, skulu gjørdar avtalur haldast.

– Eftir tí, útlendingar siga, er støðan ov ofta tann, at vit gera avtalur til ein ávísan prís, men at vit ikki himprast við at leypa frá hesi avtalu um onkur annar knappliga einaferð bjóðar eitt sindur hægri prís.

Egil Olsen sigur, at hetta er ein hugburður, sum tað er alneyðugt hjá føroyingum at sleppa burturúr, skulu vit gera okkum vónir um at vinna feskfiskamarknaðin.

### Tættari tilknýti ímillum skip og virki

Men hann heldur, at skulu vit gera okkum rættiliga galdandi á feskfiskamarknaðinum við føstum langtíðaravtalum um levering, mugu vit eisini vera til reiðar at broyta samanspælið ímillum skip og virki.

– Tað verður neyðugt við tættari samstarvi ímillum skip og virki. Skal eitt ávíst virki kunna halda langtíðaravtalur við sínar keyparar, má virkið eisini kunna gera langtíðaravtalur við sínar leverandørar, sum eru skipini.

– Tað merkir, at tað má bera til hjá virkjum at gera fastar avtalur við skip um at avreiða til virkið yvir eitt longri tíð.

Men í hesum sambandi heldur hann, at fiskidagaskipanin er ein vansi.

– Við fiskidagaskipanini vita vit ongantíð, hvussu stórar nøgdir, vit fáa. Vit hava eitt ávíst tal av fiskidøgum, men nøgdirnar av hvørjum fiskaslagi vita vit onki um. Tað er í hvussu so er ein fyrimunur við kvotaskipanini, at við henni ber tað nógv betri til at stýra fiskiskapin eftir teimum ávísu fiskasløgunum, sum marknaður er fyri.

– Skulu vit hugsa um at røkja marknaðin best møguligt, er fiskidagaskipanin sostatt ein vandi.

Hann nevnir stórar fyritøkur í Íslandi sum dømi.

Har fáa skipini boð um at vera inni aftur ávísar dagar fyri at virkini kunnu halda avtalur við keyparar um levering.

Sostatt er tað marknaðurin, sum stýrir fiskiskapinum. Tað er í veruleikanum støðan á marknaðinum sum avgerð, hvat skipini fiska og, nær tey avreiða.

Hann sigur ikki, at vit skulu aftur til tað gamla, at skipini heilt og fult skulu binda seg til eitt virki. – Men skulu vit inn á feskfiskamarknaðin, haldi eg, at ein treyt er, at tað verður munandi størri samstarv ímillum skipini og virkini.

Spurningurin er so, hvussu vit fáa fiskimenn at góðtaka eina slíkt samstarv, tí teir hava altíð tvíhildið um, teir selja, har prísurin er bestur.

– Spurningurin er, hvussu langt fram í tíðina vit hyggja. Skulu vit kanna prísin yvir eitt longri tíðarskeið, kundi tað væl víst seg, at fiskimaðurin eisini fekk ein fyrimun burturúr tí, hóast teir blivu tættari knýttir at ávísum virkjum.

### Aftur at skera við hond

Og at enda heldur Egil Olsen, at tað kundi eisini væl hent, at verðið ein gongd leið at farið aftur at skorið flak við hond.

– Ùrtøkan verður væl betri og flakið verður somuleiðis væl betri og treystari. Men hóast hetta er eitt handverk, sum skotar hava varðveitt, er hetta nú nakað, føroyingar hava gloymt. Tí er hetta eitt hondverk, sum aftur skal lærast í Føroyum.

– Men tað ber til og eg trúgvi, at keyparin er sinnaður at betala sera góðan prís fyri eina sera góða vøru.

Sostatt heldur Egil Olsen at tað eru tríggjar fortreytir, sum skulu lúkast fyri at fáa fótin fastan á marknaðin 1: Betri flutningsmøguleikar. 2: Bygnaðarbroytingar í fiskivinnuni í Føroyum 3: Vit mugu í størri mun vera til reiðar at gera langtíðaravtalur.

Umframt flak, ivast hann ikki í, at føroyskur saltfiskur fer at standa seg, tí hann hevur sera gott orð á sær.

Men tað átti aftur at verið ein fyrimunur at virka saltfisk úr púra feskum fiski, tí eg giti mær til, at hann missur í dygd við at vera dupult-frystur.

### Eitt stórt vónbrot

Egil Olsen hevur mangan víst á, hvussu alstóran týdning, gransking hevur. Tí ørkymlar tað hann, at samgongan hevur skert játtanina til gransking.

– Játtanin á fíggjarlógini stendur ikki mát við tey føgru orðini í samgonguskjalinum og tað var eitt stórt vónbrot. Men samgongan hevur boðað frá betri tíðum fyri føroyskari gransking næsta ár, so tað bíða vit spent eftir.

– Samgongan hevur ferð eftir ferð víst á, at gransking er eitt tað mest týdningarmikla av øllum og tað tykir mær løgið at skerja tað, sum hevur størst týdning.

Egil Olsen heldur tvørturímóti at tá ið trupulleikar stinga seg upp í einum samfelag, eigur júst granskingin at verða økt, heldur enn skerd.

– Tað er ongin logikkur í tí, sum er hent, sigur hann.

Eitt, sum hann hugsar um í sambandi við gransking, er at royna at menna tøkniligar haldførisloysnir til fisk.

Tað er at royna at finna útav, hvussu vit bera okkum at fyri at fáa fisk at halda sær betri.

– Íslendingar gera nógv burturúr gransking á hesum øki. Teir gera nógv burturúr at kanna tað, teir nevna superkøling, ella undirkøling, tvs, hvussu teir best og mest effektivt fáa fiskin køldan niður í eini tvey kuldastig.

– Hann vísir á, at luftalsliga skal sera nógv orka til at kølafiskin frá frostmarkinum og eitt stig niðurum.

– Fiskurin heldur sær nógv betri, beinanvegin vit fáa kølt hann niður um frostmarkið. Men á hesum øki eru íslendingar væl frammanfyri okkum. Vit mugu eisini kanna eftir, hvussu onnur bera seg at og so at seta tær góðu loysnirnar í verk í Føroyum.

Egil Olsen ivast ikki í, at verða tær tillagingar gjørdar, sum hann hevur umrøtt, so fer flakavinnan eisini at fóta sær aftur.

– At vit kappast við láglønarlond er ikki serstakt fyri fiskivinnuna. Tað er galdandi fyri allar vinnur. Men okkara uppgáva verður so at leggja dent á teir kappingarfyrimunir, vit hava. Og har er feskur fiskur ein avgjørd og stór styrki.

Men so kunnu vit afturímóti flyta tann partin av fiskivinnuni, sum er serliga arbeiðskrevjandi, til Kina.

Egil Olsen sigur, at íslendingar eru farnir at senda tann partin av fiskinum, sum nógv bein er í, til Kina at fáa hann skildan. Og so selja íslendingar aftur fiskin.

– Ístaðin fyri at koyra ein part av fiskinum vekk, hava íslendingar sæð, hvørjir møguleikar eru í láglønarlondunum og hava útnyttað hendan møguleikan.

Tað kunnu vit eisini gera, heldur hann.

Men so heldur hann eisini, at tað hevði verið ein fyrimunur at fingið smá virki, sum kundu virka servørur burturúr serligum fiskasløgum, eitt nú langasporli og stinglaksi, tí tað er fiskur, sum tað ikki slepst av við í Føroyum.

– Men hetta er fiskur, sum ikki heldur sær væl og tí er tað neyðugt við sera góðum flutningsmøguleikum fyri at tað kann bera til.

Hann vísir eisini á, at nú hevur so nógv verið at fáa av vanligu fiskasløgunum, at ongin hevur hugsað um hitt, men tað heldur hann er skeivur hugsunarháttur í longdini, tí marknaður er eisini fyri fyri teimum fiskasløgunum og tað snýr seg um at fáa alt til høldar, sigur Egil Olsen.



# Bøta um línuspælið



*Línuspælið líkist einki frá tí vanliga, tá ein sær tað……*

**Sørvingar royna eina betran av línuspælinum hjá Oilwind, sum greiðir húkarnar á stokk, so hvørt drigið verður**

TØKNI
*Edvard Joensen*

Við einum nýggjum »splittara« í spælinum, verður tað gjørt nógv léttari at egna stampin aftur, tá hann kemur á borðið.

So einfalt er úrslitið higartil teimum royndum, Bjarni Joensen í Miðvági ger við gamla, kenda línupælinum frá Oilwind.

Brøðurnir Helgi og Jákup Heri Leonson rógva út úr Sørvági við glastrevjabátinum Álitið, sum smiðjumenninir í Miðvági eiga. Samstundis royna teir eisini eitt nú nýggju ábøturnar á línuspælið, sum Bjarni Joensen arbeiðir við.

– Hetta riggar bara heilt væl, letur Jákup Heri Leonson at. Bjarni hevur gjørt ein nýggjan »splittara«, sum fangar húkin og stýrir honum beinleiðis niður á ein stokk, sum settur verður í sjálvan stampin. Stampurin verður síðan festur undir spælið, soleiðis at samband er við traktina, sum húkurin kemur ígjøgnum. Soleiðis fer húkurin beinleiðis niður á stokkin, meðan línan sjálv verður kveilað niður í stampin.



*……men húkurin fer beinleiðis niður á stokkin, og eingin snúður er í teyminum, tá egnast skal aftur*

Úrslitið hevur higartil verið gott, sigur Jákup Heri Leonson. Eingin snúður er á teymunum, tá liðugt er at draga, og tað hava egnararnir funnið útav. Og tað ger so aftur, at tað ikki stendur á hjá teimum at fáa egnarar í Sørvági.

Eitt, sum teir serliga fegnast um, er húkafangarin sjálvur. Hann riggar sera væl, siga teir. Hann tekur at kalla hvønn einasta hús, sum drigin verður og leggur niður í »magasinið«.

Línuspælið verður alla tíðina betrað og útbygt. Eitt nú kenna teir at kalla ikki til, at ein teymur er snúraður upp á ryggin meira. Tí syrgir spælið sjálvt fyri.

Í smiðjuni hjá J.K. Joensen & Soni í Miðvági arbeiða teir við eini heildarætlan, sum skal umfata bæði draging og egning.

Ætlandi skal hendan skipanin, tá hon er liðug, spara so mikið av arbeiði og kanska fólki eisini, at hon skal kunna vinnast inn aftur eftir rímiliga stuttari tíð, vóna teir.

# Heilsugóðir fiskaoljukapslar

**At eta kapslar við fiskaolju er líka gott fyri heilsuna sum at eta fisk fimm ferðir um vikuna**

HEILSA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Øll vilja vit vera frísk, og flestu vilja eisini síggja hampiliga gott út so hvørt, sum árini ganga. Tey fægstu ynskja at gerast gomul og tíðliga.

Nógv verður etið og drukkið av ymiskum úrdráttum, tí tey, sum selja hesar úrdráttir, siga, at teir eru góðir fyri hetta ella hitt.




*Ein finsk kanning vísir, at fiskaoljukapslar eru góðir fyri heilsuna*

### Góðir kapslar

Tað er líka so gott fyri heilsuna at eta kapslar við fiskaolju, sum tað er at eta feskan fisk av einum fati. Hetta vísir ein kanning hjá finskum granskarum.

Talan er um kapslarnar, Bio-Marin Pluss og kapslar við DHA.

Nakrir ungir og frískir menn vóru við í kanningini sum vísir, at kapslarnir eru líka so heilsugóðir sum at eta feskan fisk fimm ferðir um vikuna.

## Noreg keypir útlendskan fisk

**Noreg:** Fyrstu tríggjar mánaðirnar í ár innflutti Noreg fisk úr øðrum londum fyri út við 724 miljónir norskar krónur. Hetta er heldur meira enn somu mánaðir í fjør.

Í januar, februar og mars í ár var útflutningsvirðið av fiski úr Noregi stívliga 7 miljardir norskar krónur. Noreg keypir fisk úr eitt nú Stórabretlandi, Danmark, Ruslandi, Írlandi, Føroyum og Íslandi.

**-vj.**

# Tóku granskarar til gíslar



*Tað var her á Galapagosoyggjunum, at veiðimenn tóku granskararnar til gíslar*

**Galapagos:** Veiðimenn á Galapagos-oyggjunum gjørdu bart, tá ið nakrir granskarar fyrr í ár komu til oyggjarnar at kanna støðuna hjá kópi og skjaldbøkum. Teir gjørdu ikki matari enn at steingja granskararnar inni á Charles Darwin Research Center, har teir høvdu fólkini sum gíslar.

### Krevja broytingar

Menninir kravdu, at veiðireglur, sum komu í gildi í 1998 til tess at verja kóp og skjaldbøkur fyri útruddan, verða broyttar.

Veiðimenninir halda, at teirra virksemi hevur størri týdning enn arbeiðið hjá granskarum at verja kóp og skjaldbøkur við Galapagos-oyggjarnar.

Søgan sigur einki um, hvussu tiltakið spældi av.

**-vj.**